## Trygdin í lagi á Sandi

Bryggjukanturin úti í Sands Havn hevur nú fingið ein annan og meiri sjónligan lit, skrivar heimasíðan bkv. fo. Tað er annars ikki lógarkrav um at slíkir stokkar eru á bryggjukantunum, og eru tað mong sum undra seg yvir. Í onkrum av bátahylunum eru nærum ongir stokkar at síggja, men Sands Havn hevur í øllum førum síni viðurskifti í lagi.



## Alheims leiðararáðstevna

3. til 4. oktober verður ein alheims leiðararáðstevna, nevnd Global Leadership Summit 2008 í Norðurlandahúsinum í Føroyum. Á stevnuni, sum er felagskirkjulig, verða sjey undirvísingartímar. Hetta eru teir somu tímar, ið verða nýttir í teimum umleið 165 býunum, har ráðstevnan verður hildin. Upptøkurnar verða gjørdar á eini ráðstevnu í Chicago í hesum mánaðinum, og verða tær síðani sendar runt heimin. Á hesi alheims ráðstevnan fáa luttakararnir ymisk amboð, sum kunnu hjálpa til at menna samkomuna ella kirkjulið.

## Fríhandil og hvalaveiða á skránni

**Ísland:** Í komandi viku hittast 30 politikkarar úr útnorðuri, Noregi og Svøríki í íslendska býnum Grundarfjørður at viðgera um mál av felags áhuga.

Millum málini á dagsskránni er bjargingararbeiði, fríhandil og hvala- og kópaveiða, eins og viðurskiftini við ES skulu á borðið at venda.

Júst hesin spurningurin fer helst at fáa drúgva umrøðu, tí ætlanin er at londini í útnorðuri skulu styrkja um samstarvið fyri at kunna standa sterkari mótvegis ES, tá talan er um fiskivinnu og veiðu.

- Vit fara eisini at tosa um rættin hjá okkum til eina burðardygga nýtslu av øllum livandi tilfeingi, millum annað kóp og hval. Eisini ynskja vit at fáa ein felags tak fyri at formidla upplýsingar um burðardygga veiðu.

- Á henda hátt kunnu vit mótarbeiða kenslubornum og óupplýstum tjaki, sum ofta sermerkir tosið um hetta málið í londum, sum ikki hava siðir í hesum, sigur Kári P. Højgaard, sum er varaformaður í ráðnum.

Úr Føroyum luttaka Kári P. Højgaard, Andreas Petersen, Poul Michelsen, Magni Laksáfoss, Bergtóra H. Joensen og Jenis av Rana.

**sb.**

# Ein kvinna og 40 mans

**Í hesum døgum vitjar Mandskoret Sønderborg í Føroyum. Við kórinum eru um 40 mans, harav tann eini er Óli Jacobsen úr Havn, men sum starvast sum yvirlækni í Sønderborg. Tað sjáldsama við kórinum er, at tað er ein kvinna sum stjórnar hesum sangglaðu monnunum**

KÓRSANGUR

*Orð&mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Teir 40 menninir og tann eina kvinnan eru spent uppá fyrstu uppgávuna á føroyskari jørð. Fremst á myndini síggjast vinstrumegin: Óli Jacobsen úr Havn, kórleiðarin Helle Damkjær og hálvi føroyingurin Thor Vinther*

- Tað er satt fornoyilsi at vera kórleiðari hjá hesum 40 monnunum, sigur Helle Damkjær, sum hevur stjórnað kórinum seinasta hálvtannað árið.

Tað er ikki vanligt at kvinnur stjórna einum manskóri, men tá Helle varð spurd um hon vildi taka við leiðsluni í 87 ára gamla kórinum, ivaðist hon ikki eina løtu.

- Eg var eitt sindur nervøs at byrja við. Men eg má bara siga, at eg havi sjáldan havt eitt meiri lýðið og »lydhørt« kór enn hetta, sigur Helle, sum í kvøld skal stjóra kórinum á konsertini í Norðurlandahúsinum.

Á vitjanini verða tvær konsertir – henda í Norðurlandahúsinum saman við Tórshavnar Manskóri og ein í Gøtu kirkju, har sungið verður saman við kórinum Eystanljóð.

### Nýggj sangskrá

Tá Helle fyri hálvum øðrum ári síðani gjørdist kórleiðari í manskórinum, var tað ikki tí at hon hevði royndir júst við slíkum kórum áður.

Hon er útbúgvin urguleikari, og hevur í mong ár stjórnað blandaðum kórum. Nú var ístaðin neyðugt hjá henni at seta seg inn í eina heilt aðra sangskrá.

Tí, sum hon sigur: - Fyrr kundi eg bara blaða í nótunum og síðani velja sangirnar burturúr. Nú mátti eg líkasum lurta meg fram til, hvussu ein sangur fór at ljóða í einum slíkum manskóri.

- Men hinvegin, var hetta ein sera spennandi avbjóðing. Og úrslitið, - ja tað fáa tit møguleika at í kvøld og leygardagin í Gøtu, sigur Helle Damkjær, spent á málinum.

Kórið sjálvt er ógvuliga væl skipað, og stórur dentur verður lagdur á tann sosiala partin. Hetta ger eisini sítt til, at menn verða verandi í kórinum í langa tíð.

- Eg var so mikið heppin, at teir søgdu við meg, at eg skuldi bert taka mær av sanginum. Teir skuldu ordna alt hitt.

- Og so var tað heldur ikki verri, at teir lokkaðu meg við hesi Føroya-ferðini, og sum nú er vorðin veruleiki, sigur kvinnuligi kórleiðarin.

Kórið hevur nøkur føst tiltøk um árið, men hevur haraftrat vitjað í Svøríki, Onglandi, Wales og í Letlandi.

Í 2010 verður kórið vertur fyri eini landsstevnu í sangi. Og her vóna teir – ella tey! – at okkurt føroyskt kór fer at luttaka.

# Øðrvísi vikuskifti á Slættanesi

**Dagliga liggur Slættanes avtoftað, men um vikuskiftið er ætlanin at fáa lív aftur í hesa bygdina norðast á Vágoynni**

STEVNA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Leygardagin og sunnudagin skipar Sandavágs Fornminnafelag fyri einum vikuskiftistiltaki, har møguleiki verður hjá fólki at uppliva gamlar dagar og at hugna sær saman við øðrum.

Ein partur av skránni er ein framsýning í skúlanum, har dentur verður lagdur á at vísa myndir av fólki og bygdarlívi á Slættanesi.

Í skýmingini leygarkvøldið fer Knút Olsen at spæla nøkur fiól-stykkir av norska tónaskaldinum Ole Bull. Eisini fara Marjun Dalsgarð og Egin Markná at hugleiða um barna og summarminni á Slættanesi.

Á midnátt leygarkvøldið fer dansifelagið Tøkum Lætt at dansa, og seinni um náttina verður Syngi-viðløta, har Tummas Heri og Knút spæla harmoniku.

Sunnudagin verður gudstænasta í skúlanum kl. 14, har sóknarpresturin í Kvívík, Theodor Olsen prædikar.

Í samband við tiltakið gerð Vága Ríðingafelag túr úr Miðvági leygardagin kl. 15 og Vága Gongufelag av Oyrargjógv kl. 14.

Møguleiki er eisini at koma til Slættanesar sjóvegis, tí Ólavur, sum í síni tíð røkti rutuna millum Vestmanna og Fútaklett, siglir av Oyragjógv fleiri ferðir hetta vikuskiftið.